


# Norski oljugrunnurin missir milliardir í Volkswagen-gøluni

**Jógvan Hugo Gardar**

23.09.2015 - 10:30

Oljan.fo

Norski oljugrunnurin hevur seinnu árini keypt nógv partabrøv hjá týskum bilframleiðarum. Á nýggjárini átti almenni norski oljugrunnurin 3,4 prosent í Daimler-samtakinum, góð trý prosent í BMW og 1,22 prosent í Volkswagen. Hetta veit E24 at siga.

Í 2011 hevði oljugrunnurin Volkswagen-partabrøv fyri góðar fýra milliardir norskar krónur, og í 2012 var virði komið uppá góðar seks milliardir krónur. Í 2012 átti oljugrunnurin partabrøv fyri góðar átta milliardir krónur, og tá 2014 bleiv til 2015, so var ognarparturin mettur til knappar tíggju milliardir krónur.

Men nú rapar VW-partabrævið, aftaná at tað er avdúka at bilrisin hevur snýtt bæði kundar og myndugleikar við sínum royndarúrslitum sum vísa seg at vera følsk. Bilarnir eru ikki so umhvørvisvinarligur sum fyritøkan hevur sagt.

Í gjár minkaði VW-partabrævið 18,8 prosent í virði, og síðani sunnudagin er partabrævið lækkað góð 35 prosent í virði. Tá keypsskálin í Frankfurt stongdi seinnapartin í gjár var virði á VW lækkað við heili 260 milliardum donskum krónum, samanborið við virði fríggjadagin.

Tað er ikki alment hvussu nógv norski oljugrunnurin eigur í dag, tað fæst ikki at vita fyrrenn ársuppgerðin kemur um nýggjársleitið, men talan er helst um at norski oljugrunnurin hevur mist virðir fyri milliardir, bara í VW-partabrøvum.